**Umhvørvis- og vinnumálaráðið**

**Løgtingið**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 10. juni 2020 |
| Mál nr.: | 20/00359-1 |
| Málsviðgjørt: | jd |
| Eftirkannað: | 5. juni 2020 |

**Løgtingsmál nr. 149/2019: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi (Matstovulógin)** (Tíðaravmarkað heimild til landsstýrismannin at steingja matstovur og skeinkingarstøð orsakað av COVID-19)

## Uppskot til

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi (Matstovulógin)

(Tíðaravmarkað heimild til landsstýrismannin at steingja matstovur og skeinkingarstøð orsakað av COVID-19)

### § 1

Í løgtingslóg nr. 183 frá 21. desember 2018 um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi (Matstovulógin) verður í § 18 sum stk. 2 sett:

"*Stk. 2.* Fyri at forða fyri smittuspjaðing kann landsstýrismaðurin fyribils og í avmarkað tíðarskeið avmarka vanligu upplatingartíðirnar og afturlatingartíðirnar í § 17, stk. 1, 2 og 4, eins og landsstýrismaðurin kann áseta mest loyvda tal av gestum."

### § 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 31. mars 2021.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Støðan í Føroyum við COVID-19 er í løtuni góð, men tað er ógjørligt at vita, um henda støða heldur fram. Føroyar lata upp aftur fyri ferðafólki 15. juni 2020, og við økta talinum av ferðafólkum økist eisini vandin fyri fleiri tilburðum av COVID-19.

Um støðan broytist soleiðis, at landið aftur má seta tiltøk í verk at forða fyri smittuspjaðing, er umráðandi at hava røttu heimildirnar til tess. Ein av hesum er heimildin at avmarka vanligu upp- og afturlatingartíðirnar fyri matstovur og skeinkingarstøð og at áseta mest loyvda tal av gestum á matstovum. Talan kann eisini gerast um heilt at steingja matstovur og skeinkingarstøð, um støðan við COVID-19 ger tað neyðugt.

Henda heimild landsstýrismansins er avmarkað á tann hátt, at hon bara loyvir landsstýrismanninum at steingja ella avmarka ta vanligu upp- og afturlatingartíðina ella áseta mest loyvda tal av gestum fyribils og í avmarkað tíðarskeið. Hetta er grundað á, at talan er um eina serliga støðu, og at tað er umráðandi, at avmarkingarnar, sum verða ásettar, eru proportionalar í mun til støðuna.

Farsóttarlóggávan er danskt málsøki, sbr. § 1, nr. 7 í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum, og lista A, nr. 4 í heimastýrislógini. Ásetingar, sum snúgva seg um at forða fyri smittuspjaðing, eiga tískil at verða ásettar í farsóttarlóggávuni og ikki í føroyskari serlóg.

Lógartænastan hevði í sambandi við lógareftirkanningina hesa viðmerking:

*Lógartænastan skal [...] viðmerkja, at málsøkið at forða fyri smittuspjaðing er danskt málsøki (regulerað í epidemilógini). Endamálið við epidemilógini er at forða fyri smittuspjaðing í Føroyum av ávísum sjúkum, undir hesum COVID-19. [...]*

*Lógartænastan skal við hesum vísa á, at tað er ivasamt, um tað ber til í eini løgtingslóg at hava ásetingar, sum beinleiðis hava til endamáls at forða fyri smittuspjaðing, soleiðis sum lagt er upp til, av tí at málsøkið er danskt. Harumframt skal viðmerkjast, at tað er ivasamt, um matstovulógin, hvørs endamál yvirskipað er at skipa matstovuvirksemi o.s.fr. í Føroyum, og sum ikki hevur heilsulig ella onnur endamál, er rætta stað at hava eina áseting um at forða fyri smittuspjaðing.*

### 1.2. Galdandi lóggáva

Matstovulógin heimilar ikki landsstýrismanninum at avmarka upp- og afturlatingartíðir ella áseta mest loyvda tal av gestum á matstovum og skeinkingarstøðum fyri at forða fyri smittuspjaðing.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Uppskotið hevur til endamáls at geva landsstýrismanninum heimild at avmarka upp- og afturlatingartíðir á matstovum og skeinkingarstøðum fyri at forða fyri smittuspjaðing. Við broytingini fær landsstýrismaðurin fyribils og í avmarkað tíðarskeið heimild at avmarka vanligu upp- og afturlatingartíðirnar í § 17, stk. 1-2 og stk. 4. Landsstýrismaðurin fær eisini heimild at áseta mest loyvda tal av gestum, um mett verður, at tað kann forða fyri smittuspjaðing.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Víst verður til pkt. 1.1. Orsakir til uppskotið, pkt. 1.2. Galdandi lóggáva og pkt. 1.3. Endamálið við uppskotinum.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Uppskotið hevur ikki verið til ummælis.

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið ásetur, at vanligu upp- og afturlatingartíðirnar kunnu verða avmarkaðar fyri at forða fyri smittuspjaðing. Við somu grundgeving ásetur uppskotið, at landsstýrismaðurin kann áseta mest loyvda tal av gestum. At upplatingartíðin verður avmarkað og talið av gestum skert hevur fyri matstovu- og skeinkingarvinnuna fíggjarligar avleiðingar, av tí at inntøkan á henda hátt mest sannlíkt minkar.

Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið hevur ongar umhvørvisavleiðingar.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Hoyvíkssáttmálin javnsetur fyritøkur, feløg og persónar við heimstaði í Íslandi við fyritøkur, feløg og persónar við heimstaði í Føroyum. Hetta hevur kortini ikki týdning í hesum máli.

Aðrir viðkomandi millumtjóðasáttmálar eru ikki á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Mett verður, at uppskotið er í samsvari við Evropeiska mannarættindasáttmálan, sbr. Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention, og Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, sbr. Bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap.

**2.9. Markaforðingar**
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum. Mett verður ikki, at uppskotið fer at elva til markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, men í matstovulógarinnar § 23, stk. 2, nr. 2 er ásett, at við sekt ella fongsli í upp í 4 mánaðir verður revsaður tann, sum ikki lýðir boð ella forboð, givin eftir løgtingslógini ella eftir reglum, givnar við heimild í løgtingslógini.

Heimild landsstýrismansins í § 18, stk. 2 at avmarka upp- og afturlatingartíðir, undir hesum eisini at steingja matstovur og skeinkingarstøð, og at áseta mest loyvda tal av gestum, er fevnt av ásetingini í § 23, stk. 2, nr. 2, og tað er tískil revsivert, um boð landsstýrismansins eftir § 18, stk. 2 ikki verða aktað.

Um revsing eftir matstovulógini annars kann nevnast, at brot á lógina, reglur, givnar við heimild í lógini, og brot á treytir í skeinkiloyvum ella øðrum loyvum ella góðkenningum, givin eftir lógini ella eftir reglum, givnar við heimild í lógini, verða revsað við sekt ella fongsli í upp í 4 mánaðir. Á sama hátt verður revsaður tann, sum ikki lýðir boð ella forboð, givin eftir lógini ella eftir reglum, givnar við heimild í lógini. Afturat hesum verður ásett, at revsingin kann herðast til fongsul í upp í 1 ár, um brotið er framt tilvitað ella av grovum ósketni, ella um talan er um endurtakandi brot.

Mál um brot á lógina og brot á reglur, givnar við heimild í lógini, verða viðgjørd sum politimál. Hetta merkir, at politiið kann avgreiða mál við sektaruppskoti og á tann hátt sleppa undan at fara í rættin við hvørjum einstøkum broti. Fortreytin er tó, at tann skuldsetti uttanrættarliga játtar seg sekan í brotinum og góðtekur at rinda ásettu sektina. Tað er eisini ein fortreyt, at sektarstøðið frammanundan er staðfest av dómstóli, og tí kunnu brot á boð, sum landsstýrismaðurin gevur eftir § 18, stk. 2, ikki avgreiðast við sektaruppskoti, fyrr enn rætturin hevur tikið støðu til sektarstøðið.

Ásett er eisini, at tey í bekendtgørelse af lov for Færøerne om rettens pleje (rættargangslógin) nevndu tiltøk í kap. 72 um at leggja hald á og kap. 73 um rannsakan kunnu nýtast í sama mun sum í statsadvokatmálum.

Revsiábyrgd kann verða áløgd løgfrøðiligum persónum sambært reglunum í 5. kapitli í revsilógini. Tá ið sekt verður ásett eftir stk. 1-2, ella eftir reglum, givnar við heimild í lógini, skal fyrilit havast fyri fíggjarliga vinninginum, sum er fingin ella ætlaður var at fáa við brotinum.

Somuleiðis er ásett, at tann, sum stendur fyri virksemi eftir hesi lóg, kann verða revsaður við sekt fyri brot á ávísar ásetingar uttan mun til, um brotið er framt av starvsfólki og uttan mun til, um brotið er tilætlað ella framt av grovum ósketni. Í hesum føri verður sostatt ásett víðkað ábyrgdargrundarlag hjá tí, sum stendur fyri virkseminum (objektiv ábyrgd). Henda víðkaða ábyrgd er ikki treytað av, at viðkomandi sjálvur hevur brotið reglurnar ella hevur vitað, at reglurnar vórðu brotnar (subjektiv ábyrgd/culpa).

Uppskotið hevur ikki aðrar ásetingar um fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**

Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Uppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið gevur landsstýrismanninum heimild til fyribils og í avmarkað tíðarskeið við boðum ella í kunngerð at avmarka vanligu upp- og afturlatingartíðirnar, sum eru ásettar í § 17, stk. 1, 2 og 4.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur aðrar avleiðingar enn tær, ið eru nevndar omanfyri.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1**
Fyri at forða fyri smittuspjaðing av COVID-19 kann landsstýrismaðurin fyribils og í avmarkað tíðarskeið avmarka vanligu upp- og afturlatingartíðirnar í § 17, stk. 1-2 og stk. 4. Somuleiðis kann landsstýrismaðurin áseta mest loyvda tal av gestum, um mett verður, at tað kann forða fyri smittuspjaðing.

Henda heimild landsstýrismansins er avmarkað á tann hátt, at hon bara loyvir landsstýrismanninum at steingja matstovur og skeinkingarstøð ella avmarka ta vanligu upp- og afturlatingartíðina ella áseta mest loyvda tal av gestum fyribils og í avmarkað tíðarskeið.

Hetta er grundað á, at talan er um eina serliga støðu, og at tað er umráðandi, at avmarkingarnar, sum verða ásettar, eru proportionalar í mun til støðuna.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr aftur gildi 31. mars 2021.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, 10. juni 2020

**Helgi Abrahamsen**
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen